| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 31. mars 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 03/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2011 tann 31. mars kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 24. mars 2011 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Gordon M. Petersen
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann Toftegaard, sum hevði forfall.

Eftir áheitan frá Elisabeth D. Eldevig varð mál nr. 8 á dagskránni flutt til mál nr. 9 , meðan mál nr. 9 varð flutt til mál nr. 8/2011. Elisabeh D. Eldevig fór av fudinum kl. 16.55, tá ið málið um P/F Bergfrost kom til viðgerðar.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

## Mál nr. 06/2011.

**Umsókn frá Jenny Fiskå um byggiloyvi til anneks til sethúsini á matr. nr. 905 á Hellunum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Jenny Fiskå, Auglendsbakken 8B, 4018 Stavanger, dagfest 27. januar 2011 um byggiloyvi til anneks til sethúsini á matr. nr. 905 á Rættarvegi 11 á Hellunum sambært tekningum.

Tá ið ætlaða byggingin er nærri grannamarki enn 2,5 metrar, er málið tann 18. Februar 2011 sent til hoyringar hjá eigarunum av matr. nr. 243 og 128a. Napoleon Joensen, sum eigari av matr. nr. 243 hevur við skrivi, dagfestum 08. mars 2011 boðað frá, at hann einki hevur ímóti ætlaðu bygging.

Tá ið hoyringsfreistin var úti tann 15. mars 2011 hevði kommunan ikki móttikið nakrar viðmekingar frá Sigurði Toftegaard sum eigara av matr. nr. 128a.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. mars 2011 og mælir býráðnum til, at byggiloyvi verður givið soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst 1 vindeyga, sum kann verða latið upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60 cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal verða minst 1,50 m2.
3. Kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deildini, og kloakkirnar skulu verða sýnaðar og góðkendar av teknisku deildini, áðrenn tær verða tyrvdar. Har grivið verður móti granna skal arbeiðið verða gjørt soleiðis, at bakið verður tryggjað á nøktandi hátt.
4. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvið er galdandi í 2 ár frá útskrivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

## Mál nr. 07/2011

**Broyting av gjaldskrá fyri "Skipa- og vørugjøld".**

Fuglafjarðar havn hevur gjørt kommununa vara við, at trupulleikar eru at umsita § 3 í vørugjaldsskránni fyri havnina, har gjøld eru ásett fyri ymisku bátasløgini, somuleiðis sum í ávísum førum er talan um bátar, sum ikki eru flokkaðir undir nevndu grein.

Kostnaðarbólkurin hevur viðgjørt hetta mál á fundi 3. mars 2011 og er komin til ta niðurstøðu, at rættast er, at vørugjaldið verður roknað eftir vektini á bátinum og mælir havnanevndini/býráðnum til, at § 3 verður broytt soleiðis, at vørugjaldið fyri hvørji 100 kg. verður ásett til kr. 15,00.

Havnanevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. mars 2011 og mælir býráðnum til at taka undir við uppskotinum frá kostnaðarbólkinum, soleiðis at vørugjald fyri bátar fyri hvørji 100 kg. verður ásett til kr. 15,00 frá 1. apríl 2011 at rokna.

Sostatt fara takstirnir sambært § 3, sum góðtiknir vórðu á býráðsfundi 5. mai 2009 úr gildi.

**Avgerð:**
Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 08/2011**

**Lækkan av leigu hjá P/F Bergfrost fyri høll 3 á havnarøkinum.**

Umboð fyri P/F Bergfrost heitti á fundi við umsitingina tann 10. februar 2011 á kommununa um at lækka leigugjaldið fyri fjallahøll 3 á havnarøkinum úr kr. 174,00 fyri fermeturin niður í kr. 155,00 fyri fermeturin, sum er sama fermeturleiga, sum P/F Havsbrún í stuttfreistaðum leigumáli leigar fjallahøll nr. 5 fyri.

Býráðsleiðslan hevur við skrivi til fíggjarnevndina, dagfest 14. februar 2011 mælt nevndini til, at lækka leigugjaldið fyri fjallahøll nr. 3 úr kr. 174,00 niður í kr. 155,00 fyri fermeturin, við somu grundgevingum, sum lýsat eru omanfyri av P/F Bergfrost.

Henda broyting førir við sær, at § 1, stk. 2 í leigusáttmálanum millum kommununa og P/F Bergfrost fyri høll nr. 3 á matr. nr. 5005 verður broytt soleiðis, at árliga gjaldið verður lækkað úr kr. 400.000,00 niður í kr. 356.500,00 svarandi til kr. 43.500,00 + meirvirðisgjald.

Mælt verður eisini til, at broytingin verður galdandi frá 01. januar 2011 og verður sama fram til 31. desember 2021, tá ið leigumálið fer niður á vanliga fermeturleigu, sum pr. dags dato er kr. 40,00 fyri m2.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 24. mars 2011 og mælir býráðnum til at lækka leiguna fyri fermeturin úr kr. 174,00 niður í kr. 155,00, sum er sama fermeturleiga, sum P/F Havsbrún í stuttfreistaðum sáttmála leigar høll nr. 5 fyri.

Broytingin er galdandi frá 01. januar 2011 at rokna, og verður galdandi, soleingi verandi leigusáttmáli partanna millum er í gildi, hetta sambært § 1, stk. 2 við seinni broyting til 31. desember 2021. Sambært § 1, stk. 3 verður vanlig fermeturleiga rindað tey næstu 10 árini.

Meðan málið varð viðgjørt og tilmæli latið frá nevndini varð Elisaberh D. Eidevig ikki á fundi vegna ógjegni, og møtti varalimur hennara Kristina Toftegaard Larsen á fundinum, hetta sambært áheitan frá Elisabeth.

**Avgerð:**
Tilmæli frá fíggjarnevndini varð samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt luttók Elisabeth D. Eidevig ikki á fundinum vegna ógjegni.

**Mál nr. 09/2011.**

***Framleingjan av bygningi á matr. nr. 239y á havnarøkinum.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá P/F Havsbrún, dagfestur 15. mars 2011 um framleigu av bygninginum á matr. nr. 239y á havnarøkinum til Høgna Kjeld, hetta sambært sáttmála partanna millum, undirskrivað 6. apríl 2010.

Vísan verður í hesum samband á skriv frá býráðsskrivaranum, dagfest 16. mars 2011 um viðurskiftini.

Havnanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. mars 2011 og mælir býráðnum til, at átekningin verður góðtikin, og at tað verður átalað, at framleigan er gjørd uttan, at neyðug átekning er gjørd av kommununi.

Vísandi til at leigumálið millum kommununa og P/F Havsbrún gongur út tann 30. juni 2012, so verður mælt býráðnum til, at ein møgulig leingjan ikki verður ftyri meira enn 3 mánaðar ísenn, grundað á at hetta økið við stuttari tíðarfreist kann verða tøkt til annað virksemi.

**Avgerð:**
Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (9-0).

**Kunning:**
Borgarstjórrin kunnaði býráðslimirnar um gongdina í málinum viðvíkjandi uppisjóvarmatvøruvirkinum og fundir hjá kommunala arbeiðsbólkinum við Óla Samró og útlendskar íleggjararar.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.40.

Dánjal Vang

Gordon M. Petersen

Elisabeth D. Eidevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Pætur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen